Havnar SJÚKRAKASSI

# Umboðsráðsval

verður hósdagin 16. mars 2006 kl. 9.00 til kl. 18.00.

Hesi valevnir eru uppstillað til umboðsráðið hósdagin 16. mars 2006:

**Tórshavnar valdømi:**
Jákup Danielsen, Velbastaðvegur 50, Tórshavn *)
Julietta Hansen, Varðabyrgi 34, Tórshavn
Margretha Næs, Jústsgøta 2, Tórshavn *)
Solveig Sørensen, Stoffalág 40, Tórshavn *)
Ann Østerø, Rasmusargøta 9, Tórshavn

**Nólsoyar valdømi:**
Anna Marna Holm, Nólsoy *)
Torbjørg Jacobsen, Nólsoy

Teir persónar, sum eru merktir við »*)« eru umboðsráðslimir, sum hava sitið farna skeiðið.

**Havnar Sjúkrakassi**

# Búskaparfrøðingur til Hagstovuna

Hagstovan hevur eitt starv tøkt til ein búskaparfrøðing at arbeiða við tjóðarroknskapi.

Uppgávan er at vera við til at menna uppgerðina av tjóðarroknskapinum og har serliga privata vinnuliga partinum av honum.

Fremst av øllum sóknast vit eftir einum akademiskt útbúnum búskaparfrøðingi, men tað ber saktans til at søkja, um tú heldur teg hava aðrar førleikar til starvið.

Lønt verður eftir sáttmála millum Landsstýrið og avvarðandi fakfelag. Umsóknarfreistin er 1. apríl 2006, tá skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi. Vilt tú vita meira um starv, treytir og arbeiðspláss, ring so til Herman Oskarsson ella John Jacobsen á tlf. 35 28 00.

HAGSTOVA FØROYA

## Frá Froðbiar Sóknar Róðrarfelag

Ársaðalfundur felagsins verður tórsdagin 30. mars **kl. 19.00** í neystinum.

Skrá sambært lógum felagsins.

**FSR**

# Pedagogur/ varaleiðari søkjast

Vegna barnsburðarfarloyvi søkir Sandavágs kommuna eftir pedagogi/varaleiðara til Sóljugarð.

Talan er um fulltíðar starv í eini barnagarðsstovu. Møguleiki er at arbeiða niðursetta tíð. Starvið verður sett 1. juni ella eftir avtalu.

Um áhugi er fyri tí, er møguleiki at halda fram í starvi sum pedagogur.

Barnagarðurin er í 5 eindum við vøggustovu, barnagarði og frítíðarheimi. Stovnurin er vanliga opin frá kl. 7.30 til 17.00.

**Í dagliga arbeiðinum leggja vit m.a. stóran dent á trivnaðin hjá starvsfólkum og børnum umframt at hava gott samstarv bæði við starvsfólk og foreldur.**

Vit hava sera góðar umstøður, bæði uttandura og innandura.

**Okkara ynski er m.a. at tú hevur góð samstarvsevni, hevur áræði at geva børnunum avbjóðingar og at tú vilt vera við til at mynda og menna okkara pedagogiska umhvørvi.**

**Lønarviðurskifti**
Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya kommunala Arbeiðsgevarafelag og fylgir lønarstigunum frá 13 til 19.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Caritu Björklund, leiðara á tlf. 333930 lokal 10.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Sandavágs kommunu ella Sóljugarði, 360 Sandavágur, í hendi í seinasta lagi mánadagin 10. apríl 2006 kl. 12.00. Viðmerk á brævbjálvan: »Námsfrøðingur«.

SANDAVÁGS KOMMUNA


TOYOTA
reservedele

Vi kan tilbyde Danmarks største udvalg i nye og brugte reservedele til Toyota.

**Vi sender fra dag til dag til Færøerne.**

DKAUTO.DK
AUTOGENBRUG - SPECIALE TOYOTA
Flensborgvej 340 - 6200 Aabenraa
tlf. +45 7461 4110 - fax +45 7461 4164
email: salg@dkauto.dk - www.dkauto.dk

Forhenværende
Aabenraa Autogenbrug

ISO 9001
certificeret

DAG Dansk Autogenbrug - vi skåner miljø og økonomi

Autoophuggernes DATALAGER DK


**HEIMARØKTIN OG SERFORSORGIN**
*SERSTOVNADDEILDIN*

# Pedagogar til Bústovnin Eirargarði 16A/BN

Undir Almanna- og heilsumálaráðnum og stovnum undir tí við fyribils tænastu á Bústovninum Eirargarði 16A/BN verður søkt eftir pedagogum til setan 1. mai ella eftir nærri avtalu.

**Størvini**
Talan er um fulltíðarstarv, og er arbeiðstíðin 40 tímar um vikuna.
Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisarbeiði.

Á bústovninum búgva 15 menningartarnað fólk.

**Førleikakrøv**
Dentur verður lagdur á, at tann ið settur verður, er likamliga væl fyri og er áhugaður í at luttaka aktivt í øllum avbjóðingum og er opin fyri nýhugsan. Harafturat er neuðugt at arbeiða sjálvstøðugt og at samstarva við onnur, umframt at vera før/ur fyri at taka ábygd og avgerðir í arbeiðinum.

**Løn- og setanartreytir:**
Størvini eru tænastumannastørv, sett sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið á lønarstigi 24, 25, 27, 28 og 30 til 33.

Um eingin pedagogur søkir, verða størvini sett við hjálparfólki sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum v.m. skal sendast til

*Bústovnin Eirargarður 16A/BN*
*Att: Leiðarin*
*Eirargarður 16A/BN*
*FO 110 Tórshavn*

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til leiðaran á stovninum á tlf. 315422/315423.

**Umsóknarfreist: 31. mars 2006 kl. 16.00.**


STOYPIARBEIÐI



Vit átaka okkum at stoypa sethúsagrundir og onnur stoypiarbeiði

TEL 21 37 26




Sosialurin